Todi:

Vit skuldu havt skotið meiri

Føroyski álopsspælarin góðtekur, at hann varð skiftur út, tí spælið varð ikki skipað soleiðis, at hann og Zuma kundu fáa nógv burturúr

ÚTISETI
Jóannes Hansen

SOSIALURIN-KEYPMANNAHAVN:
Tað skal stríðast og drívast á, inntil dómarin hevur bríkslað fyri síðstu ferð. Tað vita øll, sum fáast við fótbólt, og veruleikin í hesum varð rudduliga undirstrikaður mikukvøldið á Brøndby stadion. Dómarin legði fýra minuttir afturat vanligu leiktíðini (TV3 fekk tað til at vera tríggjar minuttir), og vísarin var farin meiri enn tvær ferðir eyka runt, tá ið FCK fekk málið, sum bar við sær, at nú eru tað fyrst og fremst teir, sum sunnudagin skulu gera av, um teir skulu vinna DM ella ikki.

- Á stutta taktikkfundinum, sum vit høvdu, áðrenn vit fóru út í Brøndby, segði Hans Backe við okkum, at tað skuldi stríðast og spælast alla tíðina. Eisini eftir at vanliga leiktíðin var farin, og so legði hann afturat, at tað bar væl til at fáa avgerandi málið, tá ið 93 minuttir vóru farnir, visti Todi Jónsson at siga, tá ið stríðið var av, og sigurssælir FCK spælarar og leiðarar hittu pressuna.

Trúði tú uppá tað?

- So leingi, sum tað bara snýr seg um eitt mál, og tað framvegis verður spælt, so er møguleikin har. Men sjálvandi sá tað svart út, tá ið tað var so lítil tíð eftir. Eg haldi, at Brøndby gjørdi eitt stórt mistak, tá ið teir sum 2. hálvleikur leið, høvdu alt meiri hug at traðka á bremsuna. Soleiðis er tað bara. Uttan at vita av tí, so leggur tú alt størri dent á verjuspælið, tá ið tað líður ímóti dystarenda, og tú situr við langa endanum. Men nú eydnaðist tað hjá okkum, og harvið er tað upp til okkum sjálvar at gera av, um vit skulu vinna DM ella ikki. Men tað er týdningarmikið at hava bæði beinini á jørðini og minnast til, at vit hava ikki vunnið DM enn.

- So leingi, sum tað bara snýr seg um eitt mál, og tað framvegis verður spælt, so er møguleikin har. Men sjálvandi sá tað svart út, tá ið tað var so lítil tíð eftir, helt Todi eftir brakið mikukvøldið

Men tað verður neyvan nakar trupulleiki?

Treytin er, at vit sunnudagin skulu vinna ímóti AGF í Parkini. Brøndby fer heilt víst at vinna í Silkeborg. Um teir gera tað, so verður neyðugt hjá okkum at fáa øll stigini ímóti AGF, tí Brøndby hevur betri málmun, enn vit hava. Tí er ikki nóg mikið við javnleiki hjá okkum. Men tá ið vit eru komnir so mikið langt, at tað er upp til okkum sjálvar at gera av, um vit skulu vinna DM ella ikki, so eiga vit at megna uppgávuna. Um vit ikki fara at gera tað og missa meistaraheitið, so hava vit ikki uppiborið at vinna tað. Men tað verður í hvussu so er eingin trupulleiki at seta okkum upp til avbjóðingina.

Torføror umstøður

Todi Jónsson var á vøllinum fyrsta tíman. So varð hann skiftur út við Peter Møller.

Fekst tú at vita í steðginum, at tú ikki fórt at vera so leingi á vøllinum eftir steðgin?

- Nei, tað søgdu teir einki um. Men tað kom ikki heilt óvæntað á meg, at eg varð tikin út. Tað var ikki fyrrenn í síðstu viku, at eg aftur var førur fyri at venja við fullari ferð, eftir at eg havi verið skaddur í næstan tríggjar vikur. Eg havi runnið, men eg havi ikki fingið vant saman við hinum fyrrenn fyri einari viku síðani. Eg havi heldur ikki spælt so nógv. Tí sigur tað seg sjálvt, at dystarvenjingin ikki er, sum hon eigur at vera.

Ert tú nøgdur við avrikið hjá tær hesa ferð?

- Eg haldi ikki, at vit í álopinum høvdu so nógvar møguleikar. Spælið hjá okkum myndaðist upp á tann mátan, at tað fyri tað mesta vórðu langar sendingar, sum vóru lagdar fram ímóti Zuma og mær. Per Nielsen og Dan Anton Johansen í miðverjuni hjá Brøndby eru sera góðir í luftspælinum. Tað er lættari hjá verjuspælarunum, sum so at siga venda rætt, og torførari hjá álopsspælarunum, sum venda skeivt, tá ið høgu sendingarnar koma. Tí var tað torfort hjá okkum.

Kundi tú havt gjørt okkurt øðrvísi í kvøld?

- Aftaná eitt sovorðið drama hugsar man støðurnar fleiri ferðir umaftur. Sum sagt so fingu vit ikki so nógv at arbeiða við har frammi. Onkra ferðina fingu vit bóltin uttanfyri brotsteigin hjá teimum. Tá royndu vit at spæla okkum íggjøgnum, men tað var torfort, tí teir vóru so nógvir rundanum okkum. Kanska áttu vit at verið meiri avgjørdir og heldur roynt við skotum. Tá ið so nógvir eru fyri, so er møguleikin størri fyri, at málverjin sær bóltin og seint, ella at bólturin tekur í onkran verjuspælara og harvið kanska snýtir málverjan.

Farum á Europa Cup kós

Silkeborg flutti mikukvøldið niður í næstbestu deildina saman við Køge

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

SOSIALURIN-KEYPMANNAHAVN:
Mikukvøldið gjørdist tað ein veruleiki, sum sunnudagin ikki kundi gerast til annað. Silkeborg, sum í fimtan og eitt hálvt ár hevur verið partur av bestu donsku fótbóltsdeildini, flutti niður í næstbestu deildina. Tað gjørdu teir, tá ið teir á útivølli í Odense taptu 4-3 ímóti OB. Fyri hálvum sekstanda ári síðani var tað á sama vølli og við sama venjara,Viggo Jensen, at Silkeborg flutti upp í bestu deildina. Ta ferðina var tað eftir at hava vunnið á B1909.

Langt síðani niðurfluttu Køge legði rygg til eyðmýkjandi 6-1 tap í Viborg. Søren Frederiksen skoraði trý mál, og harvið gjørdist hann spælarin, sum í stívliga tíggju ára gomlu søguni hjá superliguni hevur skorað flest mál. Frammanundan átti Heine Fernandez metið við 132 málum.

Farum á veg

Fyrr í vikuni nevndu vit møguleikan fyri, at Jákup Mikkelsen nú skal flyta úr Molde og til Farum. Tíðindini eru framvegis ikki váttaði. Men tað er í hvussu so er ein veruleiki, at Farum framvegis heldur tørn um bronsuplássið og harvið møguleikan at spæla í Europa Cup.

Mikukvøldið var Farum á útivølli í Gladsaxe, har teir vunnu 2-1 á AB. AGF fekk 1-1 á heimavølli ímóti Esbjerg. Harvið misti Esbjerg tríðja plássið. Talan var um níggjunda dystin hjá AGF upp í slag, uttan at teir hava tapt. Fyri føroyskar fótbóltsfjepparar, sum taka á við Toda Jónsson og FCK, er ikki at vóna, at AGF eisini fer at megna 10. dystin uttan at tapa. Nú kunnu teir í Århus í hvussu so er gleðast um, at teir hava tryggjað sær eitt ár afturat í bestu deildini.

AaB vann 1-0 á FCM. Harvið datt FCM langt burtur frá bronsuplássinum, og AaB eigur rættin til superligupláss.

Í síðsta umfarinum, sum verður sunnudagin, er skráin henda: Esbjerg-AaB, FCK-AGF, FCMøAB, Farum-Viborg, Køge-OB og Silkeborg-Brøndby.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FCK	32	16	-	10	-	6	47	31	16	58
2 Brøndby (M)	32	15	-	11	-	6	58	31	27	56
3 Farum	32	15	-	3	-	14	48	58	-10	48
4 Esbjerg	32	12	-	11	-	9	65	56	9	47
5 OB (S)	32	11	-	12	-	9	53	49	4	45
6 Viborg	32	11	-	10	-	11	58	54	4	43
7 FCM	32	11	-	10	-	11	46	42	4	43
8 AaB	32	13	-	4	-	15	41	45	-4	43
9 AB	32	10	-	11	-	11	41	45	-4	41
10 AGF	32	10	-	10	-	12	47	55	-8	40
11 Silkeborg	32	8	-	9	-	15	48	51	-3	33
12 Køge	32	8	-	3	-	21	44	80	-36	27

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

Mótstøðan verður funnin

Á miðdegi fríggjadagin verður lutur kastaður um, hvørji mótstøðulið HB, NSÍ og KÍ fáa í Europa seinni í ár

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað verður við ikki sørt av spenningini, at umboðini hjá HB, NSÍ og KÍ fara til Nyon, har lutakastið til komandi europeisku fótbóltskappingarnar verður avgreitt.

Serliga hjá meistaraliðnum er talan um munandi peningaupphæddir, sum kunnu vinnast, bara við at vera við í kappingini. Men henda upphædd kann gerast nógv størri, um tað eisini eydnast føroysku umboðunum at vinna seg víðari í kappingini. Enn er hetta bert hent ta einu ferðina, tá ein lettiskur flúgvari ikki fekk sett seg í Vágum, soleiðis at HB kom viðari uttan at spæla heimadystin. Og hóast tey í havnarfelagnum vóru sannførð um, at tað tá hevði verið gjørligt at vunnið 1-0 tapið á útivølli aftur, so er enn einki føroyskt lið, sum hevur leikt seg víðari. Nærmast við hava tey bæði havnarfeløgini verið, men B36 gjørdist akkurát ov stutt í 1992 við samlaðum 1-2 tapi fyri Avenir Beggen úr Luxemburg, og eftir at HB í 1998 hevði vunnið 2-0 á heimavølli móti finska Vaasa, taptu teir útidystin við fýra málum móti ongum, so heldur ikki ta ferðina spurdist nakað burturúr.

Veldst um lutakastið

Hvussu verður hesaferð, er ilt at meta um, men tað skerst ikki burtur, at nógv veldst um lutakastið. Her er tað soleiðis, at liðini verða styrkismett undan lutakastinum. Føroysku liðini eru í niðasta bólkinum, og tí er ofta trupult at finna nakað yvirkomuligt mótstøðulið. Ikki minst tí fleiri av lutfalsliga nýggju eystureuropeisku londunum enn ikki hava vunnið sær nóg nógv stig til at koma úr undankappingarbólkunum, hóast tað ikki er nakað at ivast í, at styrkin hjá hesum er øgilig.

Lutakastið til kappingarnar verður sum sagt fríggjadagin á miðdegi, og eru føroysku umboðini Steinfinn Mittelstein og Birgir Enghamar fyri meistararnar úr HB. Jákup Mortensen fyri steypavinnararnar úr NSÍ og Karl Birgir Isaksen fyri KÍ,ið sum triðja liðið er við í europeiskum høpi. Gøtumenn eru í Inter-Toto kappingini, og spæla teir sín fyrsta dyst um vikuskifti á útivølli í Moldava.

Annars kann viðmerkjast, at heimadysturin hjá HB verður leiktur á Tórsvølli, meðan KÍ og NSÍ hava gjørt av, at teirra dystir verða leiktir á Svangaskarði.

Hoyvíkingur fremstur

25 tóku lut í fyrstu kappsiglingini í ár

Fyrsta umfarið í kappsiglingini hjá Seglinum var á eystanstevnu

KAPPSIGLING
Tíðindaskriv

Sunnudagin var kappsigling á Skálafjørðinum, har 25 bátar luttóku. Tað var áhugafelagið Seglið sum saman við bátafelagnum á Bakka skipaði fyri tiltakinum. Sum heild eydnaðist tað væl, sjálvt um einstakir trupulleikar vóru á leiðini. Um morgunin var stilli, fyrrapartin var hann sunnan har úti í fjørðinum, men um middagsleiti var eitt lot av landnyrðingi út eftir fjørðinum. Siglt varð tí úteftir, soleiðis at starturin var í Søldarfirði og málið á Bakka. Manningarnar møttu kl. 13 í bátahylinum á Bakka, har teir fingu vegleiðing um nýggju kappingarreglurnar, útflýggjað nummur og luttakaralista.

Í mun til undanfarin ár er kappingin hesaferð broytt nakað, soleiðis at bátarnir verða flokkaðir í tveir bólkar. Smærri bátar, sum eru smá 4-mannafør, og so størri bátar, sum eru stór 4-mannafør og størri. Stig verða givin fimm teimum fremstu bátunum í hvørjum bólki. Tá kappingin í summar er av verður »ársins sjógangari« funnin. Tað verður tann bátur, sum hevur fingið tað bestu plaseringina millum allar bátarnar í summar. Steyp ella virðislønir verða eisitni latnar fremsta bátinum í hvørjum bólki á hvørjari stevnu sær.

Aftaná kappsiglingina hittust manningarnar í og uttan fyri felagshúsið hjá Bátafelagnum á Bakka til eina hugnaløtu, har steyp vórðu handað, segl vórðu mátað og ein kaffimunnur varð drukkin í góðveðrinum.

Úrslitið av fyrstu kappsigling í ár framgongur av yvirlitinum aðra staðni á síðuni.

Føroyskur eygleiðari í London

Jon Hestoy verður eygleiðarin, sum skal tryggja sær, at alt gongur rætt fyri seg, tá kappsvimjing verður í dokkini í Themse ánni um vikuskiftið

SVIMJING
Jákup Mørk

Tann føroyingurin, sum man hava rokkið longst innan svimjing, er uttan iva Jon Hestoy, sum á sinni enntá var upptikin í Guinness-metbókini fyri 24-tíma metsvimjing.

Tað metið er tó sligið fyri nøkrum árum síðani, og aktivu svimji-dagarnir hjá Jon eru eisini taldir, men hetta merkir tó ikki, at hann heilt hevur slept ítróttini.

Eitt nú skal hann um vikuskiftið vera eygleiðari í London, tá árliga svimjikappingin í Themsen ánni er á skránni. Hetta er ein sokallað open-water kapping, har luttakararnir kappast á einum 5 kilometra langum teini.

Sjálvur sigur Jon, at hansara leiklutur her bert verður at tryggja sær, at alt gongur fyri seg sambært fyriskrivaðu kappingarreglunum, og at hann einki skal hava við sjálva dømingina at gera. Her er Jon annars ein av bert tveimum føroyskum altjóða dómarum.

- Hetta hevur tó einki sum helst við dómaragerningin hjá mær at gera. Eg skal bara vera á staðnum, undan og meðan kappast verður, og har skal so ansast eftir, at alt gongur fyri seg sambært reglunum. Um so okkurt mótmæli kemur, so skal eg taka støðu til tað, sigur Jon Hestoy.

Umframt leiklutin sum eygleiðari, eru boð eisini eftir føroyska svimjidómarum, tá EM-kappingarnar eru á skránni. Henda uppgávu er ein partur av limaskapinum í einari nevnd undir Evropeiska svimjisambandinum, ið hevur ábyrgd av kappingum á sjónum, vøtnum og áum. Jon hevur sitið í hesari nevndini síðani 1998 og er skeiðið liðugt komandi heyst.

Úrslit av kappsigling á eystanstevnu

Størri bátar

nr.	navn	heimst.	manning	stig
1	Svanur	Skála	John Mikkelsen Sóleyð Mikkelsen	5
2	Malle	Kollafjørður	Oddmar Joensen Marner Joensen	4
3	Niels í Nesinum	Tórshavn	Alfred Gullbein	3
4	Falkurin	Strendur	Kári Hansen Remy Hansen	2
5	Nón	Hósvík	Agnar Olsen Kristian Hansen	1

Smærri bátar

1	Hoyvíksbáturin	Hoyvík	Egil Simonsen Johan Simonsen	5
2	Leivur	Kollafjørður	Jón Nolsøe Olsen Kristian Sivertsen	4
3	Vinur	Tórshavn	Óli Mikkelsen Kári Mikkelsen	3
4	Dúgvan	Glyvrar	Rodmund Nielsen	2
5	Mia	Glyvrar	Kári í Garði Bárður Nielsen	1

Ársins sjógangari
støðan eftir 1. umfar

nr.	navn	bólkur
1	Hoyvíksbáturin	smærri
2	Svanur	størri
3	Leivur	smærri
4	Malle	størri
5	Niels í Nesinum	størri